Norðurlandaráðsfundur í Reykjavík:

Vónar at samstarvið tekur dik á seg

NORÐURLANDARÁÐSFUNDUR
Jógvan Hugo Gardar

Reykjavík, Sosialurin: Finski sendiharrin í Oslo, Ole Norrback, handaði á middegi frágreiðingina um rættindi norðbúgvanna til Norðurlendska Ráðharraráðið.

Flestu norðurlendingar halda at tað ikki eru størvegis trupulleikar at flyta til eitt annað norðanland. Orsøkirnar til at so er eru fleiri. Tær nøgvu norðurlendsku samstarvsavtalurnar gera sítt til tað, og tað sama kann ein siga um tey nøgvu bondini sum knýta norðurlendingar saman yvir landamørkini, vísti Ole Norrbach á í síni røðu tá hann handaði frágreiðingina.

– Norðurlendingar sum hava búð í fleiri norðanlondum kunnu siga okkum at tað eru nógvar forðingar hóast tað góða samstarvið og tær nógvu avtalurnar. Hetta vísir okkum at vit ikki eru komin á mál, og at nógv framvegis kann gerast fyri at gera norðurlendska samstarvið betri, Lógarbroytingar kunnu gerast, men vit noyðast eisini at samskipa okkum betri á fleiri økjum, segði Ole Norrbach. Han er ein av royndastu politikkarunum í norðurlendskum høpi, og hevur eisini verið finskur ráðharri.

Hann vísti eisini á at vitanin um norðurlendsku avtalurnar átti at verið munandi betri, samstundis sum vit í størri og størri mun verða ávirkaði av tí sum hendir í ES.

– Altjóða samstarvið økir skjótt og hetta setir eisini krøv til broytingar í tjóðliga lógarteksti. Tá fleiri og fleiri norðurlendingar ynskja at arbeiða og búgva í fleiri londum, so seta hesi krøv om at londini gerast betri til at samskipa lógir og reglugerðir so at landamørkini ikki gerast forðingar í teirra gerandisdegi. Ole Norrbach vísti á at norðurlendskir politikkarar hava verið undangongumenn í arbeiðnum fyri at minkað um trupulleikarnar við at ferðast um landamørkini.

– Undirtøkan millum fólk fyri tí norðurlendska samstarvinum vísir okkum at vit eiga at gera meir fyri at styrkja norðurlendska samstarvi. Tað politiska samstarvi eigur eisini syrgja fyri at okkara skipanir í størri mun vinna fram við felags sjónarmiðum á altjóða pallinum, segði Ole Norrbach. Han vónar at norðurlendska samstarvið nú tekur dik á seg og fær ein størri týdning aftur.

– Hetta er ein uppgáva sum politikkararnir kunnu gera nakað við, um teir vilja, segði Ole Norrbach.

Høgni Hoydal skrivar undir samstarvsavtalu

NORÐURLANDARÁÐSFUNDUR
Jógvan Hugo Gardar

Reykjavík, Sosialurin: Høgni Hoydal, landsstýrismaður, kemur í dag til Reykjavíkar, har hann skal undirskriva eina avtalu millum londini í Útnorðurráðnum.

Hendan avtalan skal gera tað lættari hjá Útnorðurráðnum og limalondunum at fylgja við í málum sum eru samtykt í Ráðnum.

Skrivari í Útnorðurráðnum, Ernst Olsen, sigur at hendan avtalan kemur at lætta um arbeiði hjá Ráðnum.

Limalondini, Grønland, Ísland og Føroyar, binda seg til árliga at koma við eini frágreiðing sum sigur hvar tey ymsu málini eru komin.

Útnorðuravtalan undirskrivað

NORÐURLANDARÁÐSFUNDUR
Jógvan Hugo Gardar

Reykjavík, Sosialurin: Umboð fyri Føroyar, Grønland og Ísland skrivaðu ígjár undir eina nýggja samstarvsavtalu. Hendan avtalan skal gera tað lættari hjá Útnorðurráðnum og limalondunum at fylgja við í málum sum eru samtykt í Ráðnum.

Hjalmar Árnason, alttingslimur, segði á samkomuni í sambandi við undirskrivingina í Reykjavík, at hetta er ein stórur dagur fyri samstarvið í útnorðuri. Tinglimirnir í teimum trimum limalondunum hava í nøgv ár roynt at fáa eina skipan sum tryggjar at tað sum Útnorðurráðið samtykkir verður fylgt upp í tingunum og stjórnunum í teimum trimum londunum.

Hjalmar Árnason vísti á at ein trupulleiki hevur verið at tað av og á hevur verið ógjørligt at finna aftur samtyktirnar og at fáa nærri upplýst hvussu langt londini eru komin við málunum.

Siv Friðleifsdóttir, íslendski umhvørvismálaráðharrin, segði at hendan avtalan setur niur á pappír hvussu hetta samstarvi í Útnorðuri skal arbeiða. Limalondini, Grønland, Ísland og Føroyar, binda seg til árliga at koma við eini frágreiðing sum sigur hvar tey ymsu málini eru komin.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður, segði at hendan avtalan er ein stórur sigur fyri tað arbeiði sum Erlendur Patursson í síni tíð setti ígongd. Hann legði afturat at hann vónaði at hendan avtalan kann fáa útnorðursamstarvið eitt fet longur fram.

Sára og Bjartur í norðurlendskum filmi

Á Norðurlandaráðsfundinum í Reykjavík varð filmurin "Í sama báti" frumsýndur. Sára Jógvansdóttur og Bjartur Tórhallson úr Vestmanna eru føroysku umboðini.

FILMSLIST
Jógvan Hugo Gardar

Reykjavík, Sosialurin: Filmurin "Í sama báti" er ein ferð við 16 norðurlendskum ungdómum umborð á einum víkingaskipi. Ungdómarnir hava ein dreym um eina spennandi framtíð. Filmurin er gjørdur í samband við at Norðurlandaráðið í ár er 50 ár.

Í filminum fylgja vit teimum 16 ungdómunum umborð á norska víkingaskipinum "Gaia". Tað eru feðgarnir Ivars Silis og Inuk Silis Høegh úr Grønlandi sum hava staðið fyri uppskotinum og framleiðsluni av filminum.

Inuk Silis Høegh, ið sjálvur hevur ættarbond bæði í Grønlandi, Danmark og Baltikum, sigur at hetta hevur verið ein sera spennandi uppgáva. Hetta er fyrstu ferð hann hevur havt møguleikan at vitja øll norðanlondini.

– Norðurlond vildu hava eina góða framtíð um hesi sekstan ungu fólkini vóru umborð á eini Norðurlendskari Ørk, og skuldu tryggja Norðurlondum eina framtíð, sigur Inuk Silis Høegh. Hann vísir á at hesi ungu eru inni í einum tíðarskeiði í lívinum har tey eru í eini spennandi menning, samstundis sum tey eru opin fyri framtíðini.

Heimstaðið

Umframt at fylgja teimum 16 ungdómunum umborð á "Gaia", so vitja vit eisini á heimstøðunum hjá ungdómunum.

Vit fáa millum annað møguleikan at kaga inn í nakrar av dreymunum hjá Sáru Jógvansdóttur úr Vestmanna. Vit fylgja eisini Sáru í hennara gerandisdegi í Vestmanna. Á sama hátti vitja vit heimstøðini hjá hinum ungdómunum.

Inuk Silis Høegh, ið er 29 ára gamal, sær Norðurlond sum eina litla bygd í heiminum. Hetta roynir hann at vísa okkum í tí 26 minuttir langa filminum.

– Tey ungu vóru trilvandi tá tey hittust, men gott lag og stríðsvilji broytti óvissuna til veitsluróma, har øll hugnaðu sær. Tað var stuttligt at síggja hvussu skjótt tey ungu funnu hvønn annan um landamørkini. Máltrupulleikarnir vóru loystir við skemti og kroppsmálið. Í dag veit eg at fleiri av teimum ungu framvegis halda sambandi viðlíka, og tey hava vitja hjá hvør øðrum, sigur Inuk Silis Høegh.

Til skúlar

Filmurin er vælegnaður sum partur av undirvísing í skúlunum. Umframt filmin, so hevur Norðurlendska Ráðharraráðið eisini framleitt vegleiðingarhefti og eina fløgu sum gevur neyvari upplýsingar um tey norðurlendsku londini og tað norðurlendska samstarvið.

Bústevnan
Hús & Innbúgv
útsett

Vegna løgtingsval 30. apríl og tað at valið fyri Rúnavíkar Kommunu skal verða í ítróttarhøllini, verður neyðugt at flyta messuna til 7-8 juni.

HÚS & INNBÚGV
Postbox 169 · FO-620 Runavík
Tel 44 91 91 /45 63 98 Fax 44 86 35
Fartel 22 29 82 / 26 15 44
Email nhj@post.olivant.fo

Heiðra úrmælingar

Martin Næs, landsbókavørður er millum fyriskiparanar til tiltøkini seinni í mánaðinum.

Landsbókasavnið fer seinni í mánaðinum at heiðra teir tríggjar, Jákup Olsen, Martin Joensen og Halldór Laxness, við framsýning og teir fara eisini at seta teirra dám á, tá altjóða bókadagurin verður hildin

HÁTÍÐARHALD
Heri á Rógvi

Henda valmánaðin í ár eru tað hundrað ár síðani, at heimurin fyri fyrstu ferð slap at síggja teir tríggjar Jákup Olsen, Martin Joensen og Halldór Laxness. Allir hava teir tað til felags, at teir hava gjørt seg galdandi á mentanar- og listapallinum. Bæði sum høvundar, listamálarar, teknarar v.m.

Nú tað eru hundrað ár síðani at hesir tríggir úrmælingar vóru bornir í heim, so ætlar landsbókasavnið ikki, at hetta skal fara heilt órørt í gloymibókina.

Um teir tríggjar er tað at siga, at teir allir hava gjørt seg galdandi. Flest allir føroyingar kenna óivað Martin Joensen. Hann er ættaður úr Sandvík hevur skrivað fleiri av kendastu og mest lisnu føroyskum bókunum. Hann er harumframt kendur fyri sínar stuttsøgur, sum alofta vórðu tiknar úr dagligdegnum hjá vanligi føroyinginum. Flest øll kenna skaldsøgu hansara Fiskimenn. Søgan um lívið umborð á einum fiskiskip stendur enn í dag, sum ein sannur varði í føroyskari søgu.

Martin Joensen andaðist 25. desember 1966.

Jákup C. F. Olsen, vanliga róptur Zahle, var elstur av hesum trimum, føddur 4. apríl.

Hann hevði starv á posthúsinum í Havn, men hevði eisini fjølbroyttan áhuga fyri mentan og list. Hann var virkin í Havnar Sjónleikarfelag, frá tí tað varð stovnað.

Helst eru fleiri sum ikki vita, at tað var Jákup Olsen, sum gjørdi búmerkið hjá eitt nú Havnar Hornorkestri, H. N. Jacobsens Bókahandli, Tórshavnar Sjómansheimi og sodavatnsog øletikettirnar hjá Restorffs Bryggjarí.

Jákup Olsen, sum sjálvur var listamálari, var saman við William Heinesen millum teir fyrstu, sum skipaðu fyri listaframsýningum í Havn. Á einari framsýning í tjúgunum var eisini Mikines umboðaður, hóast hann tá ikki var vorðin viðgitin. Jákup C. F. Olsen andaðist 12. juni 1963

Tann yngsti av hesum trimum, íslendingurin Halldór Laxness, ið man vera kendur av øllum føroyingum, er føddur 23. apríl. Hann verður mettur at vera ein av heimsins bestu rithøvundum í farnu øld. Hann skrivaði 52 bøkur.

Serligi stílurin hjá Laxness, sum stundum minnir um stílin í íslendingasøgunum, men sum samstundis er satira og atfinningarsemi, hevur hugtikið summi og argaði onnur. Halldór Kiljan Laxness andaðist 8. februar 1998.

Framsýning

Fyri at heiðra hesar tríggjar úrmælingarnar, sum høvdu fylt 100 í apríl, um teir vóru á lívi, skipar Føroya landsbókasavn fyri framsýning við ymiskum, sum bókasavnið hevur í varðveitslu eftir teir tríggjar. Talan er um eitt nú bøkur, handrit, brøv og myndir, sum lýsa partar av virkseminum hjá hesum trimum. Framsýningin verður sett á samkomu á Landsbókasavninum 23. apríl, sum umframt at vera føðingardagur hjá Halldór Laxness eisini er altjóða bókadagur. Á setanini er upplestur og tónleikur á skránni.

Samkoma

23. apríl er sum nevnt altjóða bókadagur. Hetta er serligur dagur fyri lokal átøk, sum UNESCO mælir til at skipað verður fyri. Á enskum hevur dagurin heitið World Book and Copyright Day.

Síðan farið varð at halda henda dagin í 1995, hava umleið 80 lond skipað fyri ymiskum tiltøkum fyri at vísa á týdningin hjá bókini sum lærumiðil og skapara av framburði og listarligari uppliving.

Hetta er fyrstu ferð, at dagurin verður hildin í Føroyum.

Landsbókasavnið heldur tað vera gott høvi at gera vart við altjóða bókadagin við einum tiltaki í sambandi við, at framsýningin "Tríggir úrmælingar frá tvey" letur upp. Tí verður skipað fyri einum kvøldi við upplestri og tónleiki 23. apríl kl. 19 á Føroya landsbókasavni. Tiltakið er alment og ókeypis.

Hetta kvøldið fara upplesarar og tónleikarar at lesa verk eftir William Heinesen, Martin Joensen og Halldór Laxness og at spæla tónleik, sum hevur okkurt samband við onkrar av teimum trimum úrmælingunum.

Fleiri upplýsingar um framsýningina og tiltakið altjóða bókadagin eru at finna á heimasíðuni hjá Landsbókasavninum www.flb.fo.

Stjórnarrættindi í andgletti

Á triðja poltiska kjakfundinum á Cafe Natúr verður heita evnið um ríkisrættarligi viðurskiftuni at kjakast um

LØGTINGSVAL
Heri á Rógvi

Unga Tjóðveldið og Sosialistiskt Ungmannafelag hava seinastu tvey mikukvøldini skipað fyri politiskum kjakfundum á Cafe Natúr í Havn. Fundirnir eru skipaðir soleiðis, at tað er eitt pallborð við einum umboði frá hvørjum flokki, ið er uppstillaður til løgtingsvalið. Hesir skulu so leggja fram, og teir fáa eisini spurningar úr hattinum, ið gongur runt millum áhoyrararnar.

Í kvøld, mikukvøldið, verður evnið stjórnarrættarliga støða Føroya, og hetta vænta fyrireikararnir fer at seta rættiligt gongd á kjakið. Flokkarnar hava eisini sínar tungu kanónir við til kjakið. Teir undanfarnu fundirnir hava snúð seg um íbúðarviðurskifti og mentan. Tað hevur verið at kalla fult hús hvørja ferð higartil, og fyrireikararnir vænta ikki minni fólk hesaferð, tá høvuðstemaið í valstríðnum kemur upp at venda.

Fundurin byrjar kl. 20.00. Fyrireikararnir heita á fólk um at møta í góðari tíð, tí væntast kann, at áhugin er stórur. Orðstýrari verður Jón Brian Hvidtfeldt, útvarpsmaður.